ÚT AT KOYRA

# Føroya Ellisakfør - motorsúkklur hittast í Hetlandi

**Áhugafelagið Føroya Ellisakfør bjóðar øllum motorsúkklistum í Føroyum til eina altjóða motorsúkklustevnu í Hetlandi, sum verður frá 3. til 5. september**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Stóra altjóða motorsúkklustevnan »Summardimm«, ið vanliga verður hildin seinast í juni, bleiv orsaka av munn og kleyv søttina í Onglandi, avlýst í ár. Tí hevur motorsúkklufólkið í Hetlandi fyrireika seg til at motorsúkklur úr Føroyum koma niður har fyrst í september. Ove Ritter, ið er fyriskipari av túrinum, sigur at umframt motorsúkklustevnuna, verða fleiri aðrir aktivitetir og høvið verður at uppliva vøkru Hetlendsku náttúruna.


*Her er Harley Davidson motorsúkklan hjá Ova Ritter á túrinum runt Ísland 2001*

**Bjóða øllum við**

Ove Ritter leggur dent á teir bjóða »øllum« motorsúkklistum við, og tey sum hava hug at koma við, skulu tekna seg hjá Føroya Ellisakførum í seinasta lagið tann 27. august á telefon 316799 fax 318099 ella mail adr: ellis@post.olivant.fo, opið er mánakvøld frá kl.20.00-22.00. Prísurin er kr.1.060,- fyri hvønn luttakara og kr.150,- fyri hvørja motorsúkklu. Ove Ritter sigur at plássið er avmarkað, og tey sum ætla sær við mugu gera skjótt av. Meira fæst at vita á internet adressuni www.leitel.fo

## Mótstøða í USA



Brúkarafelagsskapir í USA leggja nú eftir bilaídnaðinum og teimum, sum keypa teir stóru og bensinslúkandi bilarnar. Orsøkin er, at ein kanning vísir, at tey keypa hesir bilar uttan at hugsa um tað stóru bensinnýtsluna og dálkingina, tað førir við sær

*Kelda: Motor Magasinet*

## Mini við Toyota diesel



Frá 2003 av hevur BMW ætlanir um at keypa 30 túsund turbodiesel motorar frá Toyota at brúka í nýggja Mini. Motorarnir verða gjørdir á Toyota bilverksmiðjuni í Valenciennes í Norðurfraklandi.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Daimler Chrysler við Night Vision



Night Vision skipanin, ið er eitt headup display á niðasta parti á framrútinum, ið vísir livandi skapningar einar 150 metrar frammanfyri bilin, kemur at verða standardútgerð í fleiri luksusbilum, bussum, lastbilum og neyðsendarbilum frá Chrysler og Mercedes

*Kelda: Motor Magasinet*

# Ford lastbilur hjá Jón Hansen á Kongabrúnni

**Ein sum hevur savnað rættuliga nógvar gamlar myndir, er Birgar Johannessen, sum í fleiri ár á rað hevur havt stórar og sera áhugaverdar myndaframsýningar á Torginum í SMS. Vit hava lænt myndir úr myndasavni hansara.**

ELLISAKFØR
*Magnus Gunnarsson*

Hendan myndin, sum er tikin á Kongabrúnni í 1932-33, er av einum Ford lastbili hjá Jón Hansen, ið átti fleiri lastbilar. Lastbilafyritøkan hjá Jón Hansen er ein av teimum elstu í landinum. Leggið til merkis at navnið, Knud Lambaa, eisini stendur á gamla Sjóvinnubankabygninginum. Dronguri í bilinum er Eiden Müller.

*Myndaeigari: Mia Müller*






# Saab og Opel leggja saman

**Av tí at General Motors nú eigur svensku Saab bilaverksmiðjuna, skulu bilmerkini seljast undir sama taki. Tí verða Saabbilar at fáa hjá P/F Meinhard Arge frá 1. september**

BILASØLA
*Eirikur Lindenskov*

Frá 1. september at rokna er tað ikki longur Sp/F John P. Vilhelm yviri við Strond í Havn, sum selir svensku Saab bilarnar. Tí teir verða nú at fáa hjá P/F Meinhardt Arge við Oyggjarvegin í Havn.

Fyri tveimum árum síðani keypti General Motors Saab bilaverksmiðjuna í Svøríki. Hetta keyp hevur havt við sær, at Saab og Opel í Danmark hava fingið felags fyrisiting. Hetta hevur so aftur ført við sær, at fleiri Saab og Opel søluumboð í Danmark hava valt at leggja saman.

Soleiðis verður nú eisini í Føroyum.

John P. Vilhelm, sum seinastu seks árini hevur havt Saab umboðið í Føroyum, og sum annars í mong ár starvaðist hjá Tummas Ørv, sum tá var Saab umboð í Føroyum sigur, at tá leigusáttmálin hjá honum yviri við Strond varð uppsagdur, valdi hann at flyta virksemið til P/F Meinhardt Arge.

Finnbogi Arge, stjóri hjá P/F Meinhardt Arge, sigur, at felag hansara tekur yvir alt virksemið hjá Sp/F John P. Vilhelm, bilasølu, eykalutagoymslu o. a. Men hann leggur dent á, at starvsfólkini hjá Saab-umboðnum fylgja við.

Í fyrstu syftu flytir Saabumboðið inn í kjallahæddina í bygninginum við Oyggjarvegin, og verður tað framhaldandi John P. Vilhelm sjálvur, sum fer at standa fyri søluni av Saabbilunum.

Í sambandi við samanleggingina av Opel og Saab-umboðnum í Føroyum hevur fyrisitingarstjórin hjá Opel Danmark, Klaus Kibsgaard, og sølustjórin, Thomas Bruun, verið í Føroyum.

Opel Danmark, sum frá 1. oktober aftur fer at eita General Motors Danmark, umboðar merkini Opel, Cadillac, Chevrolet og nú eisini Saab.

– Vit halda, at tað er skilagott at leggja umboðini av bilmerkjum okkara saman, sigur Klaus Kibsgaard, fyrisitingarstjóri hjá Opel Danmark, tá Sosialurin hitti hann týskvøldið.

– Vit halda eisini, at Finnbogi Arge eisini hevur klárað seg væl, og vit síggja ein menningarmøguleika, nú hann eisini skal umboða Saab, sigur hann – og leggur skemtandi afturat, at Finnbogi hevur betur stundir, nú hann ikki longur er landsstýrismaður…

Opelstjórin sigur, at tað ikki er nakar trupulleiki, at P/f Meinhardt Arge eisini umboðar konkurrerandi merkini Nissan og Peugeot.

– Sjálvandi vilja vit hava, at bilmerkini hava hvør sín samleika, og at tað skal verða kundanum púra greitt, hvussu hann kemur í sambandi við Opel- ella Saab-umboðið, sigur Klaus Kibsgaard.

Hann sigur eisini, at Opel Danmark sjálvsagt ikki fer at krevja, at bilaumboðini skulu verða leys hvørt av øðrum – serliga ikki í Føroyum, her møguleikarnir eru so avmarkaðir.

– Vit síggja eisini stórdriftsfyrimunirnar á umvælingar, viðlíkahalds- og eykalutasíðuni. Við at hava fleiri bilmerki undir sama taki ber til at fáa meira burturúr – bæði hjá fyritøkuni Meinhardt Arge – men ikki minst fyri kundan, sigur Klaus Kibsgaard.


*John P. Vilhelm og Finnbogi Arge geva hvørjum øðrum hondina upp á gott samstarv, nú Opel og Saab-umboðið verður lagt saman. Teirra millum stendur Klaus Kibsgaard, sum er fyrisitingarligur stjóri hjá Opel Danmark, sum umboðar Opel, Cadillac, Chevrolet — og síðani 1999 eisini Saab. 1. oktober broytir Opel Danmark navn til General Motors Danmark*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*




*Tó at P/F Meinhardt Arge 1. september tekur yvir Saabumboðið í Føroyum, so verður John P. Vilhelm framvegis »andlitið« hjá Saab í Føroyum, tí øll starvsfólkini fylgja við, nú umboðið verður flutt til Meinhardt Arge, og John P.ø Vilhelm sjálvur fer framvegis at selja Saab*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Um Opel:**

Tann fyrsti Opel-bilurin – Opel Patentmotorvogn System Lutzmann – varð framleiddur í 1898. Stovnarin, Adam Opel, doyði trý ár frammanundan, í 1895, 58 ára gamal.

Fyrsta Opel-umboðið í Føroyum (GM) var P/F Vilhelm Nielsen, sum bygdi í J. Broncksgøtu í 1935. Fyritøkan hevði umboðið, til P/F Óli Arge keypti partafelagið í 1986. Í 1993 steðgaði alt virksemið hjá P/F Óli Arge, sum fór í likvidatión. Finnbogi Arge stovnaði sama ár P/F Meinhardt Arge, sum yvirtók virksemið hjá P/F Óla Arge og harvið eisini Opel-umboðið í Føroyum. Higar til í ár eru seldir 114 Opelbilar í Føroyum.

**Um Saab:**

Tað var í sekstiárunum, at fyrstu Saab-bilarnir komu til Føroya. Umboðið var á ymsum hondum. Eina tíð hevði Rósing Rasmussen í Runavík umboðið. Tummas Ørv fekk tann fyrsta bilin í 67 ella 68. Í 1971 varð hann biðin um at hava umboðið. Í november 76 varð John P. Vilhelm settur í starv at røkja Saab-umboðið. Í 95 yvirtók hann umboðið, sum hann 1. september letur P/F Meinhardt Arge, tó at hann sjálvur framvegis verður »Saab-andlitið« í Føroyum:

**Um Klaus Kibsgaard:**

Klaus Kibsgaard er fyrisitingarligur stjóri hjá Opel Danmark. Hann hevur starvast hjá Opel seinastu 13 árini. Vanliga verða Opel-stjórarnir skiftir út eftir eini 4-5 árum. Hóast hetta ikki er ein treyt, so er tað vanligt, at stjórar skifta og flyta millum lond. Klaus Kibsgaard byrjaði við at selja Isuzu. Hann hevur starvast hjá Opel í Frankaríki í nøkur ár, og áðrenn hann gjørdist stjóri hjá Opel í Danmark, var hann stjóri hjá Opel í Kekkia í fimm ár. Har var hann við til at økja søluna av Opelbilum í Kekkia frá 9.000 bilum árið til 65.000 bilar.

Klaus Kibsgaard tók við sum fyrisitingarligur stjóri hjá Opel Danmark 1. oktober 2000